# 320 fólk lýddu á í Lø

**RÁÐSTEVNA** Áhugin fyri fiskivinnuni er ikki so lítil, sum onkur kanska heldur. Vinnustevnan FaroExpo er ikki almenn. Har eru at kalla bara framsýnarar við, sum fundast sínámillum. Hinvegin er ráðstevnan við fyrilestrum almenn. Meðan umleið 160 fólk umboðaðu tær tilsamans 72 fyritøkurnar á vinnustevnuni í Ítróttarhøllini í Runavík, var talið av luttakarum á almennu ráðstevnuni í Løkshøll tvífalt so stórt – ella umleið 320




*Hóast atgongumerkjaprísurin fyri einstakan luttakara var 680 krónur og 580 krónur fyri bólkar við fleiri enn fimm fólkum var Løkshøll kortini fullsett á almennu FaroExpo-ráðstevnuni seinnapartin mikudagin*

Vilmund Jacobsen

Løkshøll í Runavík var fullsett, tá FaroExpo-ráðstevnan byrjaði mikudagin klokkan 13. Hóast kostnaðurin fyri luttøku í hesum almenna parti av FaroExpo var 680 krónur fyri hvønn luttakara, og bólkaprísur fyri fimm ella fleiri luttakarar var 580 krónur, helt hetta kortini ikki fólki aftur í at fara til teir fýra fyrilestrarnar.

Løkshøll tekur 320 fólk, og longu mikumorgunin høvdu 280 fólk teknað luttøku. Tá stevnan varð sett, var høllin fylt upp við áhoyrarum.

Tað vóru eisini fýra áhugaverdir fyrilestrar, sum vóru á skránni.

Petur Steingrund, fiskifrøðingur á Havstovuni, sum eisini er doktari í toski við Føroyar, setti spurningin, um fiskivinna er nytta ella ónytta.

Doktararitgerðin hjá fiskifrøðinginum snúði seg um, hvussu tað kundi bera til, at so nógvur toskur var undir Føroyum miðskeiðis í nítiárunum, tá so lítið hevði verið til árini frammanundan.

Fyrilesturin hjá honum snúði seg um, í hvønn mun fiskivinnan er til gagns fyri samfelagið, og í hesum sambandi kom hann eisini inn á í seinastuni nógv umrøddu viðurskiftini um burðardyggleika.

Pól Huus Sólstein, eksportteknikari, sum er stjóri í P/F Atlantic Pelagic í Klaksvík og hevur drúgvar royndir í uppisjóvarvinnuni á landi, legði dent á virðisskapanina av tí, sum verður fiskað.

## ... tá Sjúrður Skaale vaknaði og sá, at hann var blivin til ein handil...

Í fleiri ár arbeiddi Pól á Havsbrún, har hann seinnu árini í sínum starvi eisini var deildarleiðari á mjøl-og lýsideildini.

Árini 2005-2007 arbeiddi hann við marknaðarføring av mjøli og lýsi á íslendskum virki – og síðan 2007 hevur hann verið stjóri í P/F Atlantic Pelagic, sum er sølufelagið hjá Norðborg, ið hevði ein umsetning í fjør á meiri enn 200 miljónir krónur.

Í sínum fyrilestri í Løkshøll legði hann dent á virðisskapanina av tí, sum verður fiskað.

Á FaroExpo-ráðstevnuni hevur seinnu árini eisini "hin skeivi fyrilesturin" verið ein partur av konseptinum.

Í fjør varð hesin hildin av Jákupi Veyhe, undirhaldara og skemtara – og í ár var so tørnið komið til Sjúrð Skaale, ið bæði er kendur sum undirhaldari og seinni árini eisini sum politikari.

Sjúrður er útbúgvin samfelagsfrøðingur, og skeivi fyrilesturin hjá honum snúði seg um undirhald við innihaldi.

Samfelagsfrøðingurin, skemtarin og politikarin greiddi frá, hvussu tað var, tá hann vaknaði og sá, at hann var blivin til ein handil!

Politikkur er heimsins størsta søluvøra, og hvønn dag alt samdøgnið verður henda vøra marknaðarførd fyri ørandi upphæddir. Kortini verða eingi etisk krøv sett til marknaðarføringina, ei heldur nøkur góðskukrøv til vøruna.

Fyrilesturin hjá Atli Gregersen, fiskivinnufrøðingi, sum er stjóri í alifyritøkuni Luna, hevði yvirskriftina optimalt veiðitrýst. Hann er talsmaður fyri, at veiðitrýstið skal stillast sambært ráðgeving hjá Havstovuni.

Atli røddi um samanhangin millum veiðitrýst og veiði, og royndi at greina, hvat veiðitrýst gevur mesta búskaparliga vinningin – í fyrsta lagi til skip og manning. Atli var fyrsti formaðurin í fiskidaganevndini og hevur eisini verið í fiskiorkunevndini.

Sosialurin fer at venda aftur til onkrar av hesum fyrilestrum í næstu viku.

vilmund@sosialurin.fo



*Anna Faroe við sínum fólki undirhelt á pallinum í Løkshøll á almennu ráðstevnuni. Við setanina av vinnustevnuni í Ítróttarhøllini í Runavík sungu Hallur Joensen og Kristina Bærendsen nøkur løg*